

www.oljan.fo

**Jan Müller** 09 - 03 - 2013

# Oljan við í ósemju um Falklandsoyggjar

Fyri 30 árum síðani elvdi ósemjan tmillum Bretland og Argentina um Falklandsoyggjarnar til kríggj millum tey bæði londini. Bretland vann kríggið, og hóast argentinar ongantíð hava viðurkent bretska yvirvaldsrættin til oyggjarnar, er tað ikki fyrr enn tey seinastu árini, at argentinsku myndugleikarnir aftur hava hert orðalagið og kravið um Los Mavinas, sum argentinar rópa oyggjarnar. Orsøkin er, at tey seinastu árini er nógv olja staðfest á landgrunninum kring oyggjarnar, og henni vilja bæði bretar og argentinar hava aftur á. Argentinar halda fast um, at oyggjarnar eru teirra, og teir viðurkenna tí ikki fólkaatkvøðuna, sum er í Falklandsoyggjunum hetta vikuskiftið, har fólk verða spurd, um tey har framvegis vilja verða bretskir ríkisborgarar. Argentinski uttanríkisráðharrin, Héctor Timerman (myndin), hevur eisini sagt, at bretar kunnu heldur ikki brúka Fólkarættin í hesum føri, tí hann umfatar bara ættindini hjá upprunafólki og ikki ættindini hjá tilflytarum og teirra eftirkomarum. Myndugleikarnir í Falklandsoyggjunum hava sagt, at oljuvinnan kann byrja í 2017, og at tann nýggja vinnugreinin fer at broyta tað lítla samfelagið, sum nú dúvar upp á fiskivinnu, seyðahald og ferðavinnu. Argentinar hava gjørt greitt, at teir meta tað sum stuldur, at bretar loyva feløgum at pumpa olju upp úr undirgrundini við oyggjarnar. -Teir stjala ein part av okkara náttúrutilfeingi, segði Timerman, tá hann vitjaði í London í síðsta mánað.